# BP tilreiðar at bora í vetur eisini

**Helst fær oljufelagið BP ikki pallin til at bora Williambrunnin fyrr enn seint í heyst ella tíðliga í vetur, men hetta broytir ikki ætlaninar hjá BP at bora á landgrunninum**

OLJULEITING
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*



*Avgjørdur Hjarnar Djurhuus, stjóri: -Vit bora í ár*

– Vit eru eisini tilreiðar at bora í vetur, um so er, at vit ikki fáa boripallin fyrr enn tá. Hetta sigur Hjarnar Djurhuus, stjóri í BP. Ætlanin var at bora Williambrunnin í summar. Herfyri segði hann við Sosialin, at boringin er útsett til at byrja í september. Men eftir tí Portalurin veit, so verður pallurin neyvan klárur fyrr enn í oktober ella november. Transocean Rather, sum hevur borað eystan fyri markið í gott og væl eitt hálvt ár fyri Chevron, er komin gott og væl í helvt við síni sera umfatandi boriætlan á Rosebankleiðini. Henda ætlan fevnir um tríggjar avmarkingar- og metingarbrunnar. Í løtuni verður næsti brunnurin boraður og nú um dagarnar varð hann testaður bert 8 fjórðingar frá markinum. Hetta kundi bent á, at tað ganga ikki nógvar vikur aftrat til hesin brunnurin er liðugt boraður og so verður farið undir at bora triðja og seinasta brunnin. Tað fara so helst at ganga einir tveir mánaðir at bora hann vita vit av royndum, so vit eru í oktober ella november, tá pallurin setir kós inn á føroyskt øki, móti Williamøkinum nakað syðri og vestari.

Hjarnar Djurhuus sigur, at hóast gitingar hava verið frammi um, at BP neyvan fór undir at bora á vetrartíð undir Føroyum, og tí helst útseta boringina til í næsta ár, so er avgerð tikin um at borast skal í ár, eisini um tað verður vetur. BP hevur sett sær fyri at halda tíðarætlanina, soleiðis at borurin verður settur í í hesum árinum. Tað mesta er eisini komið uppá pláss.

Feløgini, sum skulu bora Williambrunnin, eru umframt BP eisini Shell og Andarko.


## Shell sóknast eftir skrivstovufólki

**Starvið**
Talan er um starv í umsitingini (bókhaldi og avgreiðslu) á Viðarnesi í Havn.

Í løtuni er arbeiðsøkið í høvuðsheitum:

- Vøruskráseting og tollavgreiðsla
- Bókingar og avstemmingar
- Kundaavgreiðsla, ordramóttøka o.a., serliga um telefon
- Stovnan av nýggjum avtalum og kundum
- Meirsøla av vørum og tænastum hjá Shell
- Aðrar umsitingarligar uppgávur

Føroya Shell er í ferð við at umskipa fyrisitingina. Lyklaorðini í hesum sambandi eru betri og sterkari kundatænasta og fyrisiting, har dentur verður lagdur á eitt mennandi og fjølbroytt arbeiðsumhvørvi og á førleikamenning. Í sambandi við umskipanina av fyrisitingini kunnu koma broytingar á arbeiðsøkjunum, og verður hetta tá gjørt við støði í førleikanum hjá tí einstaka. Talan er um fulltíðarstarv, men ávísir møguleikar eru at arbeiða niðursetta tíð.

**Tann, vit leita eftir**
Tað er ein fyrimunur, men ikki ein treyt, at tú hevur HH-prógv, studentsprógv ella annað samsvarandi, umframt skrivstovuútbúgving. Tú hevur royndir í skrivstovuyrkinum, ert fyrikomandi, hevur lætt við at samskifta, hevur góð samstarvsevni og arbeiðir við nærlagni. Tað er fyrimunur, um tú hevur royndir í kundaavgreiðslu og dugir at arbeiða við EDV.

**Vit kunnu bjóða**
Eitt fjølbroytt og sjálvstøðugt starv við nógvum avbjóðingum og við møguleikum fyri persónligari og yrkisligari menning. Talan er eisini um góða løn við eftirlønarskipan í samsvari við útbúgving og royndir.

Hevur tú hug at vita meiri um hetta starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Johnni Poulsen, fíggjarleiðara, telefon 34 74 00. Umsókn við møguligum prógvum og viðmælum skal sendast til P/F Føroya Shell, att. Johnni Poulsen, Postboks 188, 110 Tórshavn, ella sum teldubræv til shell@shell.fo Umsóknin má vera okkum í hendi í seinasta lagi mikudagin, 11. juli.

REPROZ



**Hugsar tú um eina betri framtíð?**
**www.shell.fo**

**Føroya Shell P/F | Vestara Bryggja 8 | Postboks 188 | FO-110 Tórshavn | Telefon 34 74 00 | Fax 34 74 90 | shell@shell.fo**